# Svenn Olsen hevði lægsta boðið

**Røktar-og Ellisheimið í Runavík verður nú útbygt, soleiðis at heimið kann hýsa 24 búfólkum aftrat. Timburarbeiðið við meira verður gjørt fyri slakar 17 miljónir krónur, um tikið verður av tilboðnum hjá gøtumanninum**



*Røktar-og Ellisheimið í Runavík verður nú útbygt við plássi fyri 24 fólkum aftrat. Ætlandi verður útbyggingin liðug longu hálvan juni komandi ár*

ÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jørð-og betongarbeiði í samband við útbygging av Røktar-og Ellisheiminum í Runavík er í gongd, og í vikuni vórðu tilboðini uppá timburarbeiði við meira latin upp á Teknistovuni í Gøtu, sum saman við Sofusi Jacobsen hevur projekterað útbyggingina.

### Svenn lægstur

Sjey tilboð komu uppá timburarbeiðið, og lægsta boðið átti Svenn Olsen, byggimeistari í Gøtu.

Tilboðið hjá gøtumanninum er uppá slakar 17 miljónir krónur, sum er einar 160.000 krónur lægri enn næstlægsta boðið.

Jørð-og betongarbeiðið er komið væl áleiðis, og ætlandi byrjar timburarbeiðið um hálvan mai. Byggitíðin er 13 mánaðir, soleiðis at nýggi parturin av Røktar-og Ellisheiminum kann standa klárur at taka í nýtslu um hálvan juni komandi ár.

Samlaða gólvvíddin í nýggju útbyggingini er út við 2.000 fermetrar stór, men ein partur av hesum er í tveimum hæddum.

Eysturoyar Røktar-og Ellisheim verður útbygt norður úr verandi bygningi.

Í tilboðnum uppá timburarbeiði, eru eisini undirveitarar, sum eitt nú skulu taka sær av tí, sum nú verður rópt hvs, t.v.s. hita, vatni og saniteti. Undirveitarar eru eisini teir, sum eitt nú taka sær av el-arbeiði, gólválegging og máling.

### Ikki undirskrivað

Svenn Olsen, sum hevði lægsta tilboðið, sigur, at enn er einki undirskrivað, men sum skilst, ætla útbjóðararnir at taka upp samráðingar við teir, sum eiga tilboðini, í komandi viku.

– Eg havi hugt okkara tilboð ígjøgnum, síðan tað gjørdist greitt, at vit vóru lægstir, og eg dugi ikki at síggja, at vit ikki kunnu standa við tað, sum boðið er.

Svenn sigur, at hann í løtuni hevur 10 mans í arbeiði, men tað er ikki óhugsandi, at neyðugt verður við nøkrum monnum aftrat, tá ið byggingin av røktar-og ellisheiminum er komin í gongd.

– Men, sum eg nevndi; enn er einki undirskrivað, sigur ein fegin, Svenn Olsen, sum hevði lægsta tilboðið.

Tá ið tilboðini vórðu latin upp á Teknistovuni í Gøtu, vóru allir teir, ið høvdu boðið uppá timburarbeiðið, hjástaddir.



*Svenn Olsen, timburmeistari í Gøtu, hevði lægsta tilboðið uppá timburarbeiði, sum eisini fevnir um ymiskar undirveitarar. Tilboðið var uppá slakar 17 miljónir krónur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stór konsert í Mentanarhúsinum

**Kallakórið Ernir úr Íslandi fer at syngja. Tórshavnar Manskór og Fuglafjarðar Sangkór verða eisini við á konsertini**

KONSERT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið, 1. mai kl. 20, verður stór konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði við luttøku av manskóri úr Íslandi og Føroyum og blandaðum kóri úr Fuglafirði.

Kallakórið Ernir úr Íslandi kemur higar til lands og fer at hava konsert í Mentanarhúsinum hetta kvøldið.

Aftrat Ernir, fara eisini Tórshavnar Manskór og Fuglafjarðar Sangkór at syngja nakrar sangir.

Tey, ið hava áhuga fyri kórsangi, kunnu gleða seg til eitt gevandi kvøld undir bestu umstøðum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, leygarkvøldið 1. mai.



*Tvey manskór og eitt blandað kór verða við á stóru konsertini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, 1. mai; Kallakórið Ernir úr Íslandi (mynd), Tórshavnar Manskór og Fuglafjarðar Sangkór*

**ítróttur**

Nr. 78 • leygardagur • 24. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

GÍ–ÍF:

# FCK álopsspælari skal spæla við GÍ

**Nýggi maðurin, sum er leigaður inntil kappingarenda í heyst, verður á liðnum, tá ið GÍ í morgin fer at taka ímóti ÍF, sum gøtumenn ongantíð hava tapt ímóti í landskappingini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Teir hava tikið rívan til í Gøtu. Í hesi vikuni hava teir samráðst við FCK um at leiga ein álopsspælara frá teimum. Fyrrapartin í gjár varð sáttmálin undirskrivaður, og nýggi maðurin ætlaðist at koma til Føroya í gjár. Hann verður á GÍ liðnum, tá ið teir í morgin fáa vitjan av grannunum hinumegin Varmakeldueið.

Annars er politikkurin hjá GÍ, at felagið fyrst og fremst skal byggja á egið tilfeingið. Tað vil siga leikarar, sum hava eitt náttúrligt tilknýtið til felagið - leikarar sum eru úr Gøtu, hava leikt við ungdómsliðum felagsins o.l. Á henda hátt skuldi kostnaðarstigi lækkast og farast skuldi aftur til røturnar í felagnum.

Talan er um Vitus Kofoed. Hann er ættaður av Bornholm, hann er 21 ára gamalur, og hann hevur verið í FCK knappliga trý tey seinastu árini. Hann hevur sáttmála við FCK inntil á sumri í 2005. Higartil hevur tað ikki eydnast honum at vinna sær álopspláss í kappingini við Zuma, Toda, Álvaro, Peter Møller, Jesper Bech og allar hinar. Men í Gøtu ivast teir ikki í, at ein spælari, sum hvønn dag venur saman við omanfyri nevndu, er nóg góður at styrkja um GÍ álopið.

– Hetta er ein av vinmonnunum hjá Atla Gregersen, sum kom úr Keypmannahavn og til okkara fyrr í ár. Teir báðir kennast frá Bornholm. Spælarin hevur víst áhuga at koma henda vegin fyri at uppliva nakað nýtt og kanska fáa eitt skump rætta vegin. Tí hava vit tosað við FCK, sum vit hava gjørt leigusáttmála við. Tað vil siga, at vit rinda leigu til FCK fyri spælaran, og FCK heldur fram at betala honum løn, sigur Jógvan Gregersen, formaður í GÍ.

Tá ið vit spyrja, um GÍ í Popczynski ikki hevur ein tann besta álopsspælaran í landinum, so sigur GÍ formaðurin, at hann kann ikki vera annað enn samdur í hesum, men so leggur hann afturat:

– Eftir at hann hevur verið nógv skaddur tey bæði undanfarnu árini, er Krysztof nú væl fyri. Men tað liggja stórar byrðar á honum. Hann er venjari og skal harvið hugsa um alt liðið umframt, at hann er høvuðsálitið hjá okkum í álopinum. Hann er aldursforseti á sera ungum liði. Vit hava leingi roynt eftir einum kompetentum manni at hjálpa honum at skjóta mál, og nú halda vit okkum hava funnið hann.

Fyrr í vár var ein AGF spælari, Martin Beck Andersen, við GÍ í Íslandi. Ætlanin var, at hann skuldi royndarvenja við GÍ, men hann varð skaddur beinanvegin og fór tískil til hús aftur úr Íslandi uttan at hava vant. Síðani hevur verið tosað um, at hann skuldi koma henda vegin. Tað verður av ongum. Í AGF eru fleiri spælarar skaddir, og tær síðstu ferðirnar hevur Martin Beck Andersen verið á superliguliðnum. Tí var tað, at teir í Gøtu fóru at samráðast við FCK um bornholmska álopsmannin, Vitus Kofoed, sum 15. juli verður 22 ár. Og í morgin fáa gøtufólk og onnur fyrstu ábendingina um, hvussu stóran tey kunnu rokna við, at fongurin verður hjá teimum.

Millummaður í samráðingunum millum GÍ og FCK hevur verið Jákup í Stórustovu.




*Krzystof Popczynski skal sunnudagin royna seg við nýggjum álopsmakkara*

### Stendur væl til

Gøtumenn komu í bestu deildina í 1980. Síðani tá hava teir ofta tykist við ÍF, sum hevur ferðast eitt sindur millum deildirnar. Higartil hevur tað ikki eydnast fuglfirðingum at vinna á GÍ í landskappingini.

Tað gjørdu teir heldur ikki í bólkaspælinum í steypakappingini. GÍ vann bólkin við fullum stigatali. Tað fór bara eitt mál ígjøgnum hjá teimum. Tað var eitt brotsspark.

Allir spælararnir, sum venja við 1. deildarliðnum hjá GÍ, eru tøkir. Eingin ivi er um, at Hallur Hansen fer at verja málið, og tað er heldur eingin ivi um plássini í verjuni og álopinum. Harafturímóti eru tað fleiri, sum kappast um at spæla á miðvøllinum saman við Súna Olsen.

### Bárður komin afturíaftur

Í fjør spældu Bartal Eliasen og Bárður á Lakjuni við GÍ. Bartal hevur higartil í ár verið í ÍF álopinum. Spæliloyvið hjá Bárði á Lakjuni er eisini í Fuglafirði. Higartil hevur hann ikki spælt nógv. Gamli knæskaðin hevur plágað. Hesa síðstu tíðina hevur Bárður aftur verið á vøllinum. Hann verður ivaleyst í ÍF hópinum í morgin, men hann verður neyvan á vøllinum frá fyrsta bríksli, tá ið ÍF fyri fyrstu ferð síðani 1999 skal royna seg í 1. deild.

Hjá ÍF er tað stórur missur, at miðvallarin Høgni Zachariassen hevur brotið eitt bein í hondini. Hóskvøldið varð ikki roknað við, at hann verður við í morgin. Eyðun Ryggshamar var millum teir fyrstu ellivu ímóti TB. Hann hevur trupulleikar í rygginum og hevur ikki vant síðstu dagarnar.

## Big Ron fekk sekkin



Ron Atkinson. Litríki bretin, sum í drúgt áramál virkaði sum venjari í fremstu ensku deildunum, fekk herfyri sekkin sum sjónvarpsvertur hjá ITV.

Í dystinum millum Monaco og Chelsea helt Ron mikrofonina vera sløkta, og tí segði hann nøkur alt annað enn vøkur orð um Marcel Desailly. Orð, sum tey allar flestu mundu skilja sum rasistisk.

Sjálvur segði Ron eftir hendinga, at hann als ikki rasistur, og vísti tvørurímóti á, at hann í venjarayrkinum hevur tikið hópin av littum leikarum inn í enskan fótbólt.

Hinvegin ásannaði hann, at hann ikki hevði annað val enn at fara úr starvinum hjá ITV, og samstundis boðaði the Guardian frá, at hann ikki longur slapp at hava sína vikuligu klummu í teirra útgávu.

**-jm**